PRIX

3. innleiðandi umfar – Mentanarhúsið í Fuglafirði – leygarkvøldið 15. februar kl. 21.00

## Braccet

**Andrias Højgaard – sang**
**Ingi Petursson Jacobsen – bass**
**Jóhan á Lakjuni – trummur**
**Arni Zachariassen – gittar**



Einaferð vóru tað nakrir ungir mans, sum høvdu tað til felags, at teir elskaðu tónleik – og Gud. Teir búðu allir í somu oyggj. Teir gjørdu í 2001 av at stovna ein tónleikabólk. Teir vóru at venja og skriva egnar sangir, og skjótt høvdu teir sangir við orku, melodium og andaligum tekstum.

Ymisk viðurskifti – so sum vantandi venjingarhøli og arbeiði – hava staðið í vegin fyri framførslum hjá bólkinum, sum fekk navnið Braccet. Nú hava teir gjørt av, at Prix Føroyar 2003 verður startskotið til eina framtíð fullari av rocki og Gudi – fyrst í Føroyum og síðani uttanlands.

Braccet síggja tann kristnað boðskapin og væl spældan og skrivaðan tónleik sum tað fremsta. Alt annað er bonus.

## Crashwave

**Dánjal Jacobsen – sang**
**Jóhannes Ólavson – ljómborð.**
**Maiken H. Hansen – gittar**
**Petur W. Háberg – bass**
**Hans Ove Johansen – trummur**

Bólkurin varð stovnaður í 1999 undir navninum Liquid Gravity. Men manningin varð skift so mikið nógv út, at avgjørt varð at skifta navn til Crashwave. Undan jólum kom trummuspælarin Hans Ove Johansen uppí, men fleiri av hinum tónleikarunum hava spælt nógv saman áður.



Dánjal Jacobsen skrivar tekstirnar hjá bólkinum, og so verður nógv av tónleikinum gjørt av tónleikarunum í felag. Tríggir av tónleikarunum eru úr Havn, men ein eiðismaður og ein vestmenningur eru eisini við.

Bólkur vónar, at luttøkan í Prixnum kann gerast ein lopfjøl til nakað størri. Tann stóri dreymur er at kunna liva av tónleikinum, men tey vóna at sleppa at spæla meira í næst-um.

Crashwave spælir tað, sum kann kallast pop/rock, og bólkurin hevur spælt til okkurt smærri tiltak.

## Krit

**Mikkjal Gaard Hansen – gittar og sang.**
**Christian Djurhuus – trummur.**
**Jan Nystrøm – gittar og kór.**
**Edmund í Garði – gittar og synthesizer.**
**Chris Shields – bass.**

Krit varð stovnað í 1997 og byrjaði við Mikkjali og Christiani. Seinni hevur Krit fingið størri manning og hevur eisini skift manning gjøgnum tíðina.



Krit var við í Prix Føroyum í 2001 og hevur spælt fleiri konsertir síðani, millum annað spældi Krit í Íslandi í oktober 2002.

Krit kann eisini hoyrast á fløguútgávu. Á Livandi Tónleikur, sum FUT tók stig til í fjør, hevur Krit ein sang við.

Teir spæla harðan rocktónleik.

## Mary's Baby

**Olivia Mikkelsen – sang**
**Sunneva Háberg Eysturstein – ljómborð**
**Knút Háberg Eysturstein – gittar**
**Símun Marni Skorastein – gittar**
**Magni Højgaard – bass**
**Allan Tausen – trummur**

Bólkurin Mary´s Baby varð stovnaður í september 2002. Knút og Símun, ið áður høvdu spælt saman í Marigold, tosaðu saman um at stovna ein nýggjan bólk og at finna eina songkvinnu til henda bólkin. Teir gjørdu av at spyrja 17 ára gomlu Oliviu Mikkelsen úr Norðagøtu, um hon tímdi at syngja, og hon játtaði. Magni kom eisini upp í leikin og hesi fýra vandu saman í einar tveir mánaðir. Eftir at hava spælt akustiskan stillan tónleik saman í eina tíð, vóru tey fýra á einum máli um, at nú var tørvur á trummum og rav magni! Tey spurdu so góða gamla Allan Tausen, um hann tímdi at spæla trummur, og hann játtaði altráður.



Tey fimm hildu tó, at har manglaði okkurt í tónleikinum. Til dømis okkurt ljóðføri aftrat. Tey fingu so Sunnevu at spæla ljómborð, og nú bar til at spæla og gera tónleik. Tónleikastílurin má sigast at vera atmosferiskur og vakur "eingla-rockur". Onkur av løgunum eru intens og larmut, meðan onnur eru meira vøkur og friðarlig.

## Masha

**Tummas Gudmundsen – sang og ljómborð**
**Jógvan Pauli Joensen – gittar**
**Albin Wang Ísakson – trummur og sang**
**John Johansen – bass og sang**



Bólkurin byrjaði at spæla í 1999. Uppruna navnið hjá bólkinum var Rusk, og teir vóru við í Prix Føroyum í 1999. Í 2001 var bólkurin aftur á heimligum Prix-palli, og tá høvdu teir fingið navnið Masha. Tá var Hans Ravnsfjall, sum nú spælir í All That Rain, sangari í bólkinum.

Fleiri útskiftingar eru gjørdar í bólkinum, nú teir aftur fara at royna seg í kappingini. Tummas Gudmundsen og Jákupi Pauli Joensen er tó framvegis við í bólkinum. Teir spæla melodiøsan rocktónleik.

Tríggir av tónleikarunum í bólkinum spældu saman í 80-ára bólkinum Arrival, og allir hava áður spælt í bólkinum Bimbs.

## Lawetz

**Høgni Reistrup – sang.**
**Ísak Sambleben – bass.**
**Høgni Fagraberg – gittar.**
**Sveinur Dam – gittar.**
**Rúni K. Mouritsen – trummur og slagverk.**
**Dávur Juul Magnusen – trombone.**

Tónleikararnir í bólkinum hava spælt tónleik í nógv ár, summir hava eisini spælt saman síðani teir vóru heilt ungir. Men samansetingin undir navninum Lawetz er fýra mánaðar gomul.

Tónleikararnir eru allir tannáringar, úr 17 og upp í 19 ára gamlar. Men talan er um tónleikarar, sum gera nógv við tað, og sum spæla annað enn rocktónleik. Fýra av tónleikarunum spæla eisini við í Føroya Symfoniorkestri, og onkur teirra stílar eftir upptøku á konservatorii um nøkur ár.

Lawetz eitt bland av poppi, rocki og eitt sindur av funk.

PRIX



# Familjuklubbi í Klaksvík

**Komandi sunnudag verður fundur í mentunarhúsinum Atlantis, har kunnað verður um, hvat ætlaninar við einum tílíkum klubba eru**

UNDIRHALD
*Solby A. Eliasen*



*Niclas Heri Jákupsson og Jógvan Eliasen, dagligur leiðari í Atlantis fara nú at seta skjøtil á ein familjuklubba í Klaksvík. Fyrsta tiltakið verður í Atlantis sunnudagin klokkan trý*

**Klaksvík:**
Tað eru teir báðir Niclas Heri Jákupsson og dagligi leiðarin í Atlantis, Jógvan Eliasen, sum hava tikið stig til henda fundin um at gera ein familjuklubba í býnum. Upprunin til hugskotið kom í fjør, tá einar tíggju familjur spontant tóku stig til gera ein vikuskiftistúr. Farið varð til Saksunar, har tey lógu í tjaldi eitt vikuskifti, har skipað varð fyri ymiskum undirhaldandi tiltøkum – einamest fyri børnunum.

Teir siga annars, at endamálið við einum tílíkum klubba er, at skipa fyri ymiskum tiltøkum, sum skulu gera lívið í einum smábýi eitt sindur meira spennandi og ríkari – ikki minst fyri børnini.

Niclas og Jógvan siga við Sosialin, at teir hava tosað um at gera ein tílíkan klubba í býnum í longri tíð nú. Men tó, er ikki endaliga avgjørt enn, hvussu ein tílíkur klubbi skal skipast ella hvørji tiltøk skulu fyriskipast, men hugskotini eru og hava verið mong.

Teir báðir halda, at hóast nógv tilboð eru at fara til í einum býi sum Klaksvík, so er tað ofta soleiðis, at ein ikki fær tikið seg saman at gera nýtslu av tilboðunum, hóast tey eru har.

– Ein skipaður familjuklubbi kann tí virka sum ein bólkatrýstari, sum umframt at fáa fólk at fara út at hugna sær, eisini kann verða við til at skapa og styrkja vinarbondini í millum limirnar, siga teir og leggja afturat, at teir til dømis hava hugsað sær, at foreldur við børnum fara í svimjihøllina ein tíma um mánaðin, at menninir leiga teldukaféina einaferð um ársfjórðingin og so framvegis.

Framhaldandi siga teir, at familjuklubbin kundi leigað KÍ-høllina onkran sunnumorgun, har skipað verður fyri familjukappingum av løttum slag. Til dømis posarenning, stafettkapping, bóltspøl og tílíkt. Eisini kann ein tílíkur felagsskapur fáa fólk úr útheiminum til Føroya at undirhalda bæði fyri ungum og vaksnum. Sum dømi nevna teir klovnar og gandakallar.

– Eisini hava vit hugsað okkum ein fastan tátt, har hugt verður eftir familjufilmi einaferð um mánaðan. Allir limir kunnu til dømis gera av í byrjanini av árinum, hvørjir filmar, ið ynskt verður at síggja restina av árinum. Síðani verður avtala gjørd við barna- og ungdómsfilmsútleigara í Danmark, ið finnur filmarnar fram, sum síðani verða sendir heim eftir avtalu. Á henda hátt fæst fatur á øllum filmunum undir skipaðum, fíggjarligum viðurskiftum á lógligan hátt. Og eins í fjør er longu avtalað at skipa fyri einari útferð einaferð um árið, siga teir og leggja samstundis afturat, at ongin sigur, at ein skal møta upp til øll tiltøkini.

### Lætt og einfalt

– Vit vilja bara, at tilboðini skulu verða har, sigur teir báðir.

Tað skal verða lætt at stýra felagsskapinum og skjótt at seta eitt hvørt tiltak í verk.

– Tí hava vit fyriskiparar gjørt av, at ein treyt fyri limaskapi er, at familjurnar góðtaka at taka ímóti boðum og svargeva yvir teldupost. Veðrið í Føroyum er sera skiftandi, og tí kann tað gerast neyðugt at boða frá einum ávísum tiltaki í eini handavend, og tað meta vit, at telduposturin kann verða sera góður til, og ikki so tíðarkrevjandi heldur, siga teir báðir.

Fyri at vita, um áhugi er fyri einum tílíkum klubba, fara teir báðir at skipa fyri einum lítlum tiltaki í Atlantis sunnudagin. Klokkan trý verður filmurin Beethoven sýndur í biografinum. Og ætlanin er so at tosa nærri um familjuklubban aftaná. Teir fara tá at leggja síni hugskot fram, og sagt verður, at øll eru vælkomin við teirra ískoytum.

Kostnaðurin fyri hetta fyrsta tiltak kemur at verða 100 krónur fyri hvørja familju, uttan mun til, hvussu mong tey eru.

Børn og vaksin fáa eitthvørt til matna, og felagssangir verða sungnir.

Hósmorgunin høvdu 80 fólk teknað luttøku til tiltakið sunnudagin. Ætlanin er, at felagsskapurin skal verða ein opin felagsskapur, har allar familjur kunnu tekna seg, og tí verður heitt á tey, ið hava áhuga fyri at verða við, um at seta seg í sambandi við Niclas Hera Jákupsson ( 225343 ) ella Jógvan Eliasen ( 227972).

# Serlig løgtingsnevnd skal viðgera grundlógarnevnd

**Tað fæst neyvan undirtøka fyri ætlanini við fólkavaldum grundlógarráð í serligu nevndini, sum løgtingið hevur sett at viðgera uppskotið um grundlógarnevnd**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*

Løgtingið hevur sett eina serliga løgtingsnevnd, sum skal viðgera uppskotið hjá Høgna Hoydal landsstýrismanni um setan av grundlógarnevnd.

Ætlanin var upprunaliga, at uppskotið, sum hevur til endamáls at føra arbeiðið við einari føroyskari grundlóg víðari, skuldi viðgerast í rættarnevndini hjá løgtinginum. Men av tí at rættarnevndin ikki er mannað við umboðum fyri allar flokkar á tingi, varð heimildin at seta nevnd sambært grein 25 í tingskipanini nýtt. Hon gevur møguleika fyri í serligum førum at skipa nevndir við umboðum fyri allar flokkar.

Tey, ið hava fingið sæti í nevndini, eru Hergeir Nielsen og Jógvan Arge fyri Tjóðveldisflokkin, Heðin Mortensen og Bárður Nielsen fyri Sambandsflokkin, Jóannes Eidesgaard og Kristian Magnussen fyri Javnaðarflokkin, Jógvan á Lakjuni og Poul Mikkelsen fyri Fólkaflokkin, Kári P. Højgaard fyri Sjálvstýrisflokkin og Jenis av Rana fyri Miðflokkin.

Serliga løgtingsnevndin skal skriva álit í málinum um eina føroyska grundlóg. Hon skal eitt nú taka støðu til, um grundlógarráð skulu veljast fyri hvørt valdømi eftir somu reglum sum við eitt løgtingsval, soleiðis sum Høgni Hoydal ætlar. Hetta hevði kravt, at heili 68 fólk skulu veljast kring allar Føroyar. Tað hava báðir andstøðuflokkarnir longu klárt sagt seg vera ímóti, og tann parturin av uppskotinum fær neyvan góðan byr, tí eisini Fólkaflokkurin í samgongu ivast stórliga.

Ætlanin var, at hesi grundlógarráðini skuldu skipa fyri hoyringum í fólkinum við vártingum eins og í gomlum døgum, men tey vera so neyvan vakt aftur til lívs á hesum sinni. Allir flokkar tykjast tó samdir um, at tað er skilagott at hoyra fólkið, og tí verður helst ein onnur loysn vald, ið tekur hædd fyri, at fólkið skal takast við upp á ráð.

# Útnorðurfundur í Reykjavík

**Seminar um menning og styrk av útnorðursamstarvinum verður hildið í Reykjavík seinni í hesum mánaðinum**

SEMINAR

Seminar um at styrkja og menna útnðorðursamstarvið verður í Reykjavík í døgunum 25. og 26 februar, sigur Nora í tíðindaskrivi.

Evnini, sum viðgjørd fara at verða, eru millum onnur hvat útnorðursamstarv í dag er? Hvussu kann tað mennast? Hvat fæst burturúr? og hvør er leikluturin hjá útnorði?

Luttakarar á seminarinum verða yvirhøvur umboð fyri stovnar og feløg, eins og embætisfólk og politikarar eisini verða við.

Seminarið hevur til endamáls at savna fólk og feløg, sum starvast í útnorði. Bæði politisk, fyrisitingarlig, mentanarlig og onnur, siga fyrireikararnir millum annað í tíðindaskrivinum.

Tilmelding til seminarið kann gerast hjá NORA á Bryggjubakka í Havn, annaðhvørt á tlf. 33 31 10 ella á telduposti nora@nora.fo

Meldast skal til skjótast gjørlig, siga tey í tíðindaskrivinum. Luttakararnir skulu sjálvir syrgja fyri gisting í Reykjavík.

**ej**